# Lisberg, munnharpa og pappkassar

**Høgni Lisberg borgaði fyri góðari framførslu í Flagstjaldinum á Summarfestivalinum**

Summar FESTIVALUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Høgni Lisberg var partur av fríggjadagsskránni á Summarfestivalinum og hann spældi í Flagstjaldinum.
Saman við dugnaligu manning síni borgaði hann fyri góðari framførslu, sum í mestan mun hevði nýggjastu løg hansara at bjóða.
Just Digg er eitt lag sum situr sera væl og tá teir spældu lagið sum nummar tvey í konsertskránni, so tóktist tað, sum vóru teir upphitaðir og tað sama kann sigast um lurtarafjøldina, sum beinanvegin tók lag og bólk til sín.

**Stuttligari**

Høgni og manningin sá út til at hugna sær og tað ljóðaði eisini so.
Hóast Høgni er, ella var, partur av harkaliðnum, sum kom fram í eyðkenda tónleikaliðnum úr Gøtu á sinni, so hevrur hann ein nógv ljósari dám yvir sínum løgum. Og júst hetta gjørdi, at konsertin var løtt, góð og livlig. At hann hevði góða manning afturat sær gjørdi ikki verri.
Og ein skilir væl, at fólk bæði úti og heima hava tikið Høgna og tónleikin til sín.
Høgni er trummuleikarin, ið trein framum múrin av trummum, tók guitaran, og gekk egnar leiðir. Og tað tykist, sum leiða tær gøtur, ið hann hevur valt, hann langt áleiðis á heldur vandamiklu ferðini á alheims tónleikapallinum.
Fleiri góð løg eru millum nýggju løgini hjá Høgna Lisberg og sera hugnaligt var tað, tá Høgni tók munnharpuna fram og Brandur kom fram um trummurnar og fór at leika á ein stóran pappkassa. Tá var talan um okkurt, ið er onkrastaðni millum country, bluesrock og bluegrass.
Fyri at nýta orðini hjá Høgna sjálvum, so gjørdist alt nógv stuttligari í hesi løtu.
Móti endanum kom eitt lag við heitari reaggae rútmum og orðleysum strofum, sum fólk kunnu læra upp á 10 sekund, um tey ikki kenna tað áðrenn.. Og við hesum megnaði Høgni at fáa fjøldina við og at fáa framførsluna at ríða á bylgjukambunum.






# Dropar sungu í dropa-veðrinum

**Barnakórið Dropar úr Havn hevði eina sera sjarmerandi konsert í Flags-teltinum í dag. Tað vóru heilt fitt av fólki samlað saman til konsetina. Kórið megnaði veruliga at fáa lív í áhoyrarnar við teirra lætta og glaða sangi.**

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Barnakórið Dropar, sum er stjórnað av Sigrið Rasmussen, er mannað við ungum gentum og dreingjum úr høvuðsstaðnum. Tað sæst á teirra framførslu, at Sigrið gongur sera høgt uppí sítt arbeiði, og Dropar er helst mest "professionella" barnakórið í landinum.
Tónleikararnir eru góðir, og sangirnir, sum kórið syngur, eru kendir. Millum annað sungu tey "Can You Feel The Love Tonight" hjá Elton John. Eisini sungu tey kenda temasangin til filmin "Titanic".

Sigrið og børnini megnaðu veruliga at fáa áhoyrarnar "við uppá tað". Serliga síðsti sangurin "Tað verður betri" fekk áhoyrarnar at syngja við og klappa til. Lógvabrestirnir vóru øgiligir millum sangirnar. Tá ið konsertin var liðug, varð kórið klappað uppaftur, men stramma skráin á Summarfestivalinum viðførdi, at eykalagið varð av ongum.